HOFF STOFF

# Kongavitjanin av á hesum sinni

**Við flogfarinum hósdagin kl. 17 fóru tey kongaligu avstað aftur til Danmarkar, eftir eina stutta og strævna, men kortini spennandi vitjan í Føroyum.**

HOFF STOFF
*Snorri Brend*

**Vágar:** Henda seinasta dagin undir vitjanini kom ein lítil broyting í skránna. Ætlanin var at krúnprinsahjúnini skuldu fara til Mykinesar, men orsakað av ringum veðurlíkindum á staðnum, varð henda vitjanin avlýst.

Drotningahjúnini fullførdu kortini sína skrá, við vitjan í øllum bygdunum í Vágoynni, har tey heilsaðu uppá fólkið, men gávu sær eisini tíð at vitja børnini og tey gomlu. Seinasta tiltakið á skránni var ein tíðindafundur seinnapartin fyri føroysku og útlendsku tíðindafólkunum á Hotel Vágum. Tá hann var liðugur kl. 15:30 var vitjan teirra í Føroyum samstundis at enda komin.

Á tíðindafundinum vórðu tey m.a. spurd um, nær tey koma aftur næstu ferð. Svarið var greitt, at tað skal ikki ganga so long tíð til tey vitja aftur á oyggjum okkara eina aðru ferð.

- Vit hava havt eina sera góða vitjan, her vit hava møtt "en mase herlige mennesker", sum Margretha drotning málbar seg.

– Tað var eisini gott fyri Mary at læra hetta landið at kenna, sum vit trý kenna so gott. Jú, hetta hava verið góðir dagar, segði hon.



*Børnini kundu ikki geva Mary nóg nógvar blómur. Her má hon lata upp vindeygað fyri at taka ímóti trimum smørsóljum frá einum dreingi í Miðvági*

# - Ein vís kvinna

**John Myllhamar stóð so trúliga í vindinum og bíðaði eftir, at drotningahjúnini skuldu koma til bygdina. Hann hevur bert sæð drotningina eina ferð áður – fyri mongum árum síðani, tá hon var sum barn í Føroyum.**

Hoff Stoff
*Snorri Brend*

Sandavágur: - Margretha dugir sera væl at bera seg fram. Og tað er ikki mong, sum duga so væl at málbera seg sum júst hon. Tað tók eina løtu hjá fólki at bíða eftir at drotningahjúnini skuldu koma til Sandavágs. Men hetta forðaði kortini ikki bygdarfólkinum at offra hesa løtuna í vindi og kulda til móttøkuna av hesum heiðurliga gesti.

Millum tey – kongatrúgvu – sum bíðaði eftir henni í Sandavági var John S. Myllhamar.

Hóast hann hevur búð í Danmark í mong ár, hevur hann bert sæð drotningina eina ferð áður – tá Margretha var ung genta. So hetta var ein serstøk løta, eisini fyri John, nú Margretha og Heinrikur vitjaðu bygdina, har hann er búsettur.

- Margretha er ein vís kvinna, - eingin ivi um tað. Og so hevur hon eisini greiðar meiningar um tingini.

- Eg minnist, at hon einaferð varð spurd um, hvat kristindómurin hevði at týða fyri hana. Tá svaraði hon so vísiliga: "Kristindómurin er líka so náturligur fyri meg, sum tað at blóðið rennur gjøgnum æðrarnar".

- Jú, hon er ein vís kvinna, sigur John S. Myllhamar.



*Kongatrúgvi, John Myllhamar hevur ikki sæð drotningina síðani hon var barn. Nú fekk hann aftur hetta høvið í heimbygdini, Sandavági*